# Fleiri enn Mósebøkurnar



*Fríðtór Debes hevur givið sína sættu bók út*

**Fyristøðumaðurin í samkomuni Rhema í Havn hevur givið út sættu bók sína við andaligum innihaldið. Hendan bókin er um tungutalu sum bønarmál**




BÓKAÚTGÁVA
*Edvard Joensen*

Fríðtór Debes hevur á forlagnum Rhema givið út bókina »Bønarmál títt-tungutalan«.

Hetta er sætta bók hansara við andaligum evni. Sostatt er hann farin fram um Mósebøkurar í tali. Men tær eru kortini rúgvusmiklari, heldur hann.

Í bókini setir hann upp tíggju orsøkir til at nýta tungutalu í bøn síni. Umframt eru í bókini tríggir kapitlar, sum viðgera tungutalu annars. Hvat fólk halda um hana. Hvat fyribrigdið tungutala er, umframt eina frágreiðing um tungutalu sum tekin hjá vantrúgvandi.

Fríðtór Debes sigur um bókaútgávur sínar, at eins og hinar fimm fyrru bøkurnar hevur hendan sætta eisini andaligt tema. Sum heitið sigur, er tað í hesum førinum tungutalan.

Hann hevur í teimum fyrru bókunum viðgjørt ymisk evni sum eitt nú heimsmissión, regluligt bønarlív og pengar.

– Tað er so, sigur Fríðtór Debes, at Bíblian talar rættiliga nógv um pengar og búskap. Á ymsan hátt.

Bíblian hevur yvir 31.000 ørindi, og umleið ein fimtingur av hesum, ella umleið 6.000 ørindi, tala á einhvønn hátt tum pengar og pengaviðurskifti. Tað verið seg tíggjund, skuld, skatt ella hvat nú kann koma fyri, tá tosað verður um pengar.

Tungutala hevur verið nýtt frá fyrsta degi, Heilagi andin kom til kristnu samkomurnar, sigur Fríðtór Debes og vísir til Apostlasøguna, har sagt verður frá hvítusunnuundurinum. Tá hendi tað, at menn fóru at tala í tungum, og øll tey, ið til staðar vóru, skiltu teir.

Soleiðis hevur verið síðan. Her er talan um mál, sum ónáturliga er givið okkum frá Guði og sum verður nýtt sum bønarmál millum okkum og Guð, sigur Fríðtór Debes.

Paulus var ein, sum brúkti tungutaluna nógv, sigur Fríðtór Debes. Og soleiðis hevur hon verið regluliga brúkt bæði at tí einstaka í stillari bøn og á fundum og samkomum, har hon verður brúkt til prædikur.

Men tað er ein onnur síða tá tosað verður til mannfjøld við týðing, sigur Fríðtór Debes, fyristøðumaður í samkomuni í Rhema í Havn.

Tað, hann viðgerð í hesi bókini, sigur hann, er tann persónliga samrøðan við Guð, har tungutalan verður nýtt.

# Loppugras er besta føroyska boðið

**Yrkingasavnið, Loppugras, er innstillað til barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins 2004**

BARNABÓKAVIRÐISLØN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Yrkingasavnið Loppugras er innstillað til barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins 2004. Yrkingar eigur Sólrun Michelsen.*
*Mynd: Savnsmynd*

Seinnapartin hósdagin kunngjørdi føroyska ummælisnevndin, at føroyska yrkingasavnið, Loppugras, er innstillað til barna- og ungdómsbókavirðislønina í Útnorði í 2004. Ummælisnevndin heldur, at samansjóðanin av orðum, myndum og tónum hevur eydnast sera væl í savninum-og so mikið væl, at Loppugras hevur uppiborið eina viðurkenning.

Yrkingasavnið er eitt tyssi av12 ymiskum barnaolg tvætlirímum. Loppugras er ein blanding av yrkingum, myndum og tónleiki.

Sólrun Michelsen eigur yrkingarnar í savninum, meðan Hanni Bjartalíð hevur gjørt myndirnar. Við yrkingarsavninum fylgir eisini við ein fløga við. Tað eru børn í 3.A á Eysturskúlanum undir leiðslu av Joannu Johansen. Pauli Hansen eigur løgini á fløguni

### Viðkomandi

Ummælisnevndin heldur eisini, at málið í bókini er lætt at lesa, og myndamál, samanberingar og rímini, sum høvundurin brúkar, venda sær beinleiðis til børn og gerandisdagin hjá børnum. Nevndin metir eisini, at rímurnar standa einki aftanfyri tær hjá millum annað Alexanduri Kristiansen og Hans Andreasi Djurhuus.

# Sangløta í Siloa

**Kórið í Siloa bjóðar til sangløtu og ein drekkamunn í Fuglafirði nú sunnukvøldið**

TÍÐINDASKRIV



Nógvu tey seinastu árini hevur sangkórið í Siloa í Fuglafirði verið við til at sett dám á jólafyrireikingarnar og jólini. Tey hava bjóðað til sangløtu, har tað serliga hevur verið lagdur dentur á jólasangir og harvið boðskapin, sum verður knýttur at jólunum.

Aftur í ár bjóðar kórið í Siloa til sangløtu uppundir jól. Kórið fer at syngja í Siloa nú sunnukvøldið klokkan 20.30. Sungið verður í umleið hálvanannan tíma, og aftaná verður bjóðað til ein drekkamunn.

Siloakórið hevur fjølbroytta skrá. Tað mesta er á føroyskum. Onkur útlendskur sangur verður at hoyra, og uppaftur onkur er á skránni, sum heilt nýliga er umsettur til føroyskt.

Undirspælið er fjølbroytt, og fýra solistar fara at syngja saman við kórinum. Teir eru Elisabeth Hansen, Karolina Højgaard, Elsebeth Lassaberg og Bárður á Lakjuni.

Ætlanin er at sangbólkurin Salt eisini skal syngja í Siloa sunnukvøldið. Serligar umstøður gera, at tað ikki fer at bera til fyrrenn sunnukvøldið at siga heilt víst, um tey kunnu luttaka.

Sólvá og Klæmint Eliasen fara inn ímillum sangirnar at lesa tekstir, sum snúgva seg um jólaboðskapin.

Eyðun á Lakjuni hevur stjórnað Siloa kórinum síðani í 1988, og tað ger hann eisini hesa ferð.

# Eivør Pálsdóttur í Leikalund

Mánadagin 22. desember er møguleikin at hitta Eivør Páldóttir í Leikalund í Klaksvík. Her fer hon at signerða nýggju fløgu sína »Krákan«.

Fløgan er sera væl umtókt bæði her heima, men so sanniliga eisini aðrastaðni. Millum annað hevur hon fingið 6 stjørnir frá Gaffa, sum er kendt danskt tónleikatíðarrit. Í Íslandi hevur hon fingið framúr ummælir, er innstillað til bestu fløgu í Íslandi í ár og



hevur eisini her selt sera nógv.

Á fløguni eru 11 sangir. 9 av sangunum hevur Eivør sjálv skrivað og sett tónleik til. Hini bæði eru gomul føroysk skjaldur, harav tað eina er "Krákan situr á steini", sum fløgan eitur eftir.

Eivør fer eisini at spæla nøkur løg "unplugged" Tiltakið byrjar klokkan 17.00.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael ætlar sjálvt at seta markið

**Ariel Sharon hóttir nú við at skilja ísraelsmenn og palestinar sundur einaferð med alla. Ætlanin møtir mótstøðu í sjálvum Ísrael og í USA**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Ariel Sharon hóttir nú við at skilja ísraelsmenn og palestinar sundur einaferð med alla*
*Mynd: Reuters*

Ísraelski forsætisráðharrin ætlar sær eftir øllum at døma ikki at samráðast við palestinska forsætisráðharran, Ahmed Korei, og hann hevur eftir øllum at døma eisini slept friðarætlanini, saum ST, ES, USA og Russland hava gjørt.

Í hvussu er hevur Ariel Sharon nú lovað ísraelsmonnum, at halda palestinararnir ikki treytirnar í hesi somu friðarætlanini, fer Ísrael at slíta alt samband og alt samskifti við palestinararnar. Tað segði hann hóskvøldið. Tann sonevndi trygdarmúrurin verður gjørdur liðugur, og ísraelski herurin skal halda palestinum uttanfyri. Um tær jødisku niðursetubygdirnar í teimum palestinsku økjunum segði Sharon, at nakrar teirra verða tiknar niður og fluttar inn um markið.

Hesin seinasti parturin av ætlanini hjá Sharon hevur fingið harða mótstøðu í Ísrael. Politikarar á høgravonginum eru í øðini, og nakrir ráðharrar, teirra millum uttanríkisráðharrin Silvan Shalom og fíggjarmálaráðharrin Benyamin Netanyahu hava mótmælt alment.

Hugskotið hjá Sharon fellur heldur ikki í góða jørð í USA. Stjórnin í Washington ávaraði longu hóskvøldið Ísrael ímóti at taka nakað einvegis stig og mælti Sharon til at tosa við palestinska forsætisráðharran um, hvussu farast skal fram.

Sjálvur sigur Ahmed Korei, at vil Sharon samráðast, kann friður fáast í lag skjótari, enn fólk munnu ímynda sær.

# Hann myrdi 48 kvinnur



*Gary Ridgeway myrdi 48 kvinnur og fekk 48 ferðir lívlangt fongsul*
*Mynd: Reuters*

**Gary Ridgway fekk 48 ferðir lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava myrt 48 kvinnur.**

DRÁPSMAÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

At hann ikki varð dømdur til deyða kemst av, at hann játtaði at vísa løgregluni, hvar hann hevði myrt kvinnurnar, og hvar hann hevði jarðað tær.

Gary Ridgeway, sum í sínum dagliga yrki málaði lastbilar, viðgekk undir avhoyringum, at hann hevði beint fyri 48 ungum kvinnum, og hann verður hildin at vera tann ringasti hópdrápsmaðurin í amerikanskari rættarsøgu.

Tær flestu kvinnurnar myrdi hann nærhendis ánni Green River við býin Seattle, og alment verður hann tí umrøddur sum Green Riover-drápsmaðurin.

Áðrenn hann kunngjørdi úrskurðin, bað dómarin Gary Ridgeway venda sær ímóti áhoyrarunum í rættarsalinum, tí tey flestu vóru avvarðandi hjá kvinnum, sum hann hevði beint fyri.

## Noreg skal úr EBS

Tveir politiskir flokkar í Noregi, Miðflokkurin og Sosialistiski Vinstriflokkurin, hava gjørt av at skjóta upp, at Noreg skal siga seg úr EBS-samstarvinum fyri at fáa ein betri sáttmála við ES. Uppskotið verður lagt fyri Stórtingið fyrsta dagin og hevur samband við, at tíggju lond afturat koma upp í ES tann 1. mai næsta ár.

Sosialistiski Vinstriflokkurin var í síðstu viku til reiðar at taka undir við tí nýggja EBS-sáttmálanum, men flokkurin hevur nú broytt hugsan. Flokkurin sigur nú, at hann tekur undir við kravinum frá Miðflokkinum, sum vil hava stjórnina at taka upp samráðingar við ES um ein betri handils- og samstarvssáttmála, og sum kann geva Noregi fleiri fyrimunir, enn EBS-sáttmálin gevur.

Teir báðir flokkarnir ásanna, at uppskotið fær ikki meiriluta í Stórtinginum, men teir vænta, at summir tinglimir hjá Arbeiðaraflokkinum fara at atkvøða fyri tí, tí í tí flokkinum er heldur ikki semja um EBS-samstarvið.

## Blair í andróðri

Eins og George W. Bush, forseti, hevur Tony Blair, forsætisráðharri, notið gott av, at fyrrverandi einaræðisharrin í Irak, Saddam Hussein, er tikin.

Í einari meiningakanning hjá blaðnum The Daily Telegraph sæst, at 38 prosent av bretsku veljarunum høvdu atkvøtt fyri Labour-flokkinum, var parlamentsval nú. Tað er tvey prosent meiri enn í einari kanning í november. Men tað er ivasamt, hvussu stóran ugga Blair sær í hesum, tí kanningin vísir samstundis, at tann konservativi andstøðuflokkurin fær framvegis størri undirtøku enn stjórnarflokkurin. Kanningin gevur teimum konservativu 39 prosent, eitt prosent minni enn í november.

Misnøgdin við kríggið í Irak og eitt uppskot hjá stjórnini um at krevja eitt avgjald frá teimum lesandi á lærdu háskúlunum hava kostað Labour og Blair nógvar atkvøður í hesum árinum.

## Vandamikið skip

Norskir myndugleikar og umhvørvisverndarfelagsskapir eru ikki fegnir um tíðindi úr Murmansk, um at menn har eru í ferð við at ferma 130.000 tons av olju umborð á tangaskipið "Trader", sum síðani skal sigla fram við norðurnorsku strondini út í Atlantshavið.

Sambært norska útvarpinum hevur skipið einkultan skrokk, og tað verður ikki hildið at samsvara við tað, sum russisku myndugleikarnir hava sagt. Boðini haðani eru, at norðmenn hava einki at óttast, tí skipini, sum ferma olju í Murmansk, eru trygg. Men eitt tangaskip við einkultum skrokki kann ikki sigast at vera eitt trygt skip á vetrardegi í Barentshavinum, siga norðmenn.

Umhvørvisverndarfelagsskapir í Noregi leggja myndugleikarnar undir at hava mist tamarhaldið á russiska oljuflutninginum. Teir vísa á, at "Trader" hevur tríggjar ferðir so nógva olju sum "Exon Valdez", sum fór á land í Alaska og elvdi til eina ovurstóra náttúruvanlukku har. Norsku tilbúgvingarmyndugleikarnir hava eisini viðgingið, at teir hava ikki ta neyðugu útgerðina, skuldi ein vanlukka hent.

## Schwarzenegger í trupulleikum

Fíggjarliga støðan í amerikanska statinum Kalifornia er so ring, at hóskvøldið varð staturin lýstur í búskaparliga undantaksstøðu.

Tað eru annars bara nakrir fáir dagar, síðani tingið í statinum samtykti eitt spariuppskot hjá Arnold Schwarzenegger, guvernøri. Men nógvir borgarstjórar í Kalifornia hava síðani mótmælt uppskotinum, tí tað fer millum annað at skerja útreiðslurnar til løgregluna og sløkkiliðini, siga teir. Svarið frá guvernørinum kom hóskvøldið, tá hann lýsti statin í búskaparliga undantaksstøðu, tí á tann hátt kann hann taka avgerðir uttan at spyrja tingið.

Á einum tíðindafundi hóskvøldið segði guvernørurin, at hann fer at geva býunum 900 milliónir krónur afturat til løgregluna og sløkkiliðini, men hann segði einki um, hvaðani hann fer at taka pengarnar. Kalifornia er í ovurstórum trupulleikum. Roknað verður við, at staturin hevur einar 180 milliardir krónur í halli í ár.